Sosialurin

TELEVARPIÐ

# VARPIÐ




Dr1 • Sunnudag 7. kl. 19.00

**»Fra Thailand til Thy«**

Í Norðurjyllandi búgva 575 teilendskar kvinnur. Tær flestu búgva í Thy og eru giftar sjómonnum og bóndum. Ofta kenna genturnar ikki mennirnar, sum tær gifta seg við. Filmurin greiðir frá teilendsku kvinnunum í Danmark og fylgir eini teilendskari gentu, sum júst er komin til Thy.



Dr1 • Mánadag 8. kl. 19.00

**»Attenborough – koldblodigt eventyr« - 4:5**

Fyri 95 milliónum árum síðan høvdu forfedrarnir til slangurnar bein. Men hesi bein vóru í vegin, tá ið ein fongur skuldi fáast til vega. So niður gjøgnum ættarliðini gjørdust beinini minni og minni, inntil tey so heilt hvurvu.



Dr2 • Fríggjadag 5. kl. 22.20

**»Dresden« - 1:2**

Romantiska stuttrøðin »Dresden« er hin dýrasta týska sjónvarpsframleiðslan nakrantíð. Og hyggjaratølini vóru hareftir. Felicitas Woll er týska sjúkrasystirin Anna og John Light hin bretski flogskiparin Robert.

**Fríggjadagur 5. september 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**